

*Petra og Absalon í Tjørnustovu*



*Milja var dóttir Petru og Absalon í Tjørnustovu. Hon var gift við Elias Martin hjá Langa Petur Hansi. Tann dagin í 1933, Dinnafía var inni á gólvinum í Tjørnustovu, vóru stólarnir útlæntir til barsil hjá Milju og Elias Martin*



*Hetta er myndin av Elspu Sofíu, 1893-1917, ommu skrivaran av hesi frásøgn, sum Dinnafía minnist at hava sæð í Tjørnustovu í Norðragøtu í 1933, og henda myndin hongur enn í sama stað*

Jákup Pauli ikki fekk etið, og at hann bert kundi fáa føði gjøgnum eitt súgvirør. Restin av søguni um Jákup Paula var í frásøgnini hjá Dinnufíu í seinasta parti.

Frida greiðir eisini frá um, tá mamman Hansina doyr tvey ár seinni. Hon var sera sjúklig alla sína tíð. Hon hevði havt kikhosta sum barn og hevði hostað so illa, at lunguni vóru skadd. Hetta bara versnaði, og 2. jóladag 1931 legst hon í seingina, og hon doyr 26. mars 1932, tvey ár eftir, at Jákup Pauli kemur heim aftur av sjúkrahúsi í Danmark. Hetta er páskaaftan, tá kirkjuklokkan ringdi fyri páskum, og síðan tá dámdi Fridu einki at hoyra kirkjuklokkuna ringja fyri høgtíð.

Nú mamman var deyð, mátti tað vera Frida, sum var 15 ára gomul, ið mátti taka ábyrgdina av húsarhaldinum og taka á seg allar tær skyldur, sum mamman annars hevði havt, sum t.d. at mjólka, at ganga til neyta og annars tað, sum var at gera í einum húsi.

Sum nógvar aðrar gentur hevði Frida hug til at royna okkurt annað enn at vera heima, sum t.d. at fara av bygdini í húspláss ella fiskaarbeiði. Eisini hevði hon hug til at fara at læra at seyma. Men hetta bar als ikki til. Hon kundi snøgt sagt ikki fara frá pápanum, so skerdur sum hann var. At seyma dugdi hon kortini væl. Hetta lærdi hon av mammuni, sum sjálv hevði lært í Havn.

Eftir hesa sera truplu lívsbyrjan fekk Frida kortini eitt gott lív. Hon fekk ein góðan mann, Tummas Debes, sum giftist inn til teirra. Tey bæði giftust sama dag sum Dinnafía og Jógvan Sofus 3. desember 1937. Frida og Tummas høvdu verið góð, síðan tey vóru 10 og 12 ára gomul! Tá Frida væntaði fyrsta barnið, ynskti hon so hjartaliga, at tað skuldi verða ein drongur, so hon fekk kallað beiggjar sínar upp. Tað var eisini ein sonur, sum fekk navnið Poul Hans Jacob, sum býr í Skopun.

Hóast Frida ikki slapp "út" sum ung, slapp hon tað seinni. Tá ið hon var 50 ára gomul, fór hon út at sigla við Tummasi, sum var stýrimaður, og tá slapp hon longri út í heim, enn hon hevði droymt um sum ung. Tá kom hon til Amerika, í Miðalhavið, í Svartahavið og aðra staðni. Sjálv var hon eisini sera takksom fyri tað lív, hon fekk. Frida var eitt framúr menniskja, sum hugsaði um øll. Skilagóð var hon sum fáur, hon mintist allar føðingardagar í ættini.



*Inni í Tjørnustovu hitti Dinnafía eisini sonin, sum búði í húsinum, Óla Jákup, sum var einkjumaður. Her sæst hann saman við sínum synum Albert t.v. og Vilhelm. Vilhelm mintist Dinnafía frá tí, hann varð konfirmeraður við Gjógv í 1929, og hon kendi hann aftur í Vági, tá hon fór hagar at vaska fisk í 1935*

## Sangurin hjá Sigurd Joensen

Sorgarleikurin við Acorn setti sjálvsagt sín dám á bygdina. Hetta verður væl lýst av Sigurd Joensen, sum seinni gjørdist kendur sakførari. Hann var 17 ára gamal í 1928. Tá skrivaði hann ein sang til fráhaldsfelagið við Gjógv. Her skulu verða endurgivin tvey ørindi, sum vísa til teir, sum doyðu við Acorn. Tey ljóða so:

*Nú man felagið ársgamalt vera,*
*sum av unglingum stovnað*
*her var.*
*Stórar sorgir tað hevur at bera*
*yvir limir, tað misti frá sær.*

*Ja, vit limirnar mistu teir bestu,*
*tí er sorgin nu nívandi tung,*
*burtur eru nú garparnir reystu,*
*sorgin tyngir tí gomul og ung.*



*Barslið, sum Dinnafía minnist, var hjá Ólfríðu, sum verður 74 ár í summar. Her sæst hon saman við beiggja sínum Absalon, uppkallaður eftir abbanum.*

## Konfirmatión

Eg konfirmeraðist sjálv í 1931 í Fuglafirði. Tá var Karl Sørensen Hvass prestur. Prestahús vóru bygd tá í Fuglafirði. Vit vóru 3 konfirmantar frá Gjógv. Brim var, so vit gingu til Funnings. Haðani vóru 4 konfirmantar. Mamman at einum teirra fekk leigað ein motor úr Funningsfirði. Hann førdi okkum til Fuglafjarðar. Vit vóru 12 tilsamans við teimum, sum fóru við konfirmantunum.

Tað skal skoytast uppí, at Gjógv er brimpláss, og tað var ofta, at tað ikki var siglandi til Gjáar. Tá kom báturin til Funnings, og neyðugt var at fara til gongu hagar. Hetta var ein fittur teinur, minst ein tími hvønn vegin, og tað var sera tungt at ganga oman aftur til Gjáar. Brekkan niðan úr Funningi er bæði brøtt og tung. Tá menn fóru til skips ella komu av skipi høvdu teir eisini nógv viðføri við sær, og tað skuldi berast. Hetta gjørdi tað ikki léttari.

Smiril sigldi eisini til Gjáar, men hetta kundi eisini taka sína tíð. Í 2003 hevði FF-blaðið samrøðu við ta tá 102 ára gomlu Onnu Askham, sum hevði verið við Gjógv og ferðast og skuldi við Smirli aftur til Havnar. Hendan ferðin tók trý samdøgur. Leggjast skuldi at ymsa staðni. Afturat hesum gjørdist illveður.

## Jógvan bróðir verður konfirmeraður í Gøtu

Í 1933 verður yngri beiggi mín Jógvan konfirmeraður. Teir vóru tríggir konfirmantar frá Gjógv. Ofta fór onkur við børnunum, tá ið tey fóru av bygd at "ganga at lesa," at fyrireika seg til konfirmatiónina. Eg fór so við Jógvan beiggja, eg var tvey ár eldri enn hann. Ein var sum æt Inga, og mamma hennara fór við henni. So var tað ein sum æt John, og systir hansara fór við honum. Hon hevði verið arbeiðskona hjá Líggjas bónda, og tey gistu har. Líggjas bóndi og Jógvan Sofus vóru trímenningar.

Vit búðu hjá Jóan Magnusi har Niðri í Syðrugøtu. Har búðu eisini Inga og Lena. Jóan Magnus var ein kendur skipari, og var umrøddur í røðini um Andrias í Tarti í FF-blaðnum. Vit skuldu búgva hjá gamla Jóan Paula, sum tey kallaðu. Jóan Pauli var sonur gamla Magnus, sum var beiggi Pætur og Jógvan í Barbustovu, og vóru vit tískil skyldfólk. Jóan Pauli átti sonin Magnus, sum í Gøtu var nevndur Magnus hjá gamla. Konan æt Anna Sofía, og hon var systir Jóan Magnus har Niðri. Har høvdu vit biðið um hús, tí gamli Jóan Pauli hevði verið at vera í Jákupsstovu við Gjógv sum húskallur. Vit fóru við einum báti til Fuglafirðar, hann kallaðist "Svenskarin". So fóru vit til Gøtu við bili. Tá ið vit koma til Gøtu, kemur ein kona ímóti